**Sáttmáli millum millum Havnar Arbeiðarafelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið**

Sáttmálin fevnir um starvsfólk, sum koyra evju - súgvara á Brennistøðini í Tórshavnar kommunu.

Sáttmálin byggir á høvuðssáttmálan millum Havnar Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag.

**Løn**
Mánaðarlønin svarar til vanliga sáttmálaløn við 10 tíma degi. Lønin verður roknað sambært sáttmálanum millum Havnar Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag § 4 pkt. d ("reinsan av kloakk").

Lønarútrokning: Mánaðarlønin byggir á 216,67 tímar/mðr.

**Arbeiðstíð**
Fasta arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna, meðan løn verður goldin fyri 50 tíma viku. Lønin fyri 10 eyka tímarnar er lutvís samsýning fyri at verða tøkur, meirarbeiði o.l.

**Úrtíðararbeiði**
Allir tímar út yvir normalarbeiðstíðina í nevnda høvuðssáttmála verða fyri hvønn dagin sær roknaðir sum yvirtíð, við teimum yvirtíðartakstum, sum eru nevndir í sáttmálanum millum Havnar Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Allir yvirtímar verða umroknaðir til normaltímar, og verða síðani at fríganga og útgjalda soleiðis sum er ásett niðanfyri.

Meirarbeiði upp til 9 normaltímar um mánaðin skulu frígangast. Yvirtímar yvir 9 normaltímar ein mánað verða avspákaðir ella útgoldnir sambært hesum ásetingum:

Miðað verður eftir at starvsfólk støðugt hava í mesta lagi uppspardar 40 tímar til góðar. Eru tímarnir ikki avspákaðir áðrenn 2 mánaðar + leypandi mánaða frá tí at úrtíðararbeiðið varð gjørt, verða tímarnir útgoldnir.

Vaktargjald og úrtíðargjald verða ikki veitt fyri somu tímar.

Starvsfólkini fáa hvønn mánaða yvirlit yvir talið av tímum, tey eiga til góðar.

**Tilkallivaktarskipan**
Tey starvsfólkini, sum hendan avtalan fevnir um, luttaka í eini vaktarskipan við samsýning sambært nevnda sáttmála, so at vakt er allar dagar í árinum soleiðis:
- Gerandisdagar til kl. 24.00
- Um vikuskifti, halgidagar og frídagar frá kl. 08:00 til 24:00

ıȷ5 ac

**Annað**
Har ikki annað er nevnt í hesum sáttmála, eru ásetingarnar í høvuðssáttmálanum millum Havnar Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag galdandi.

**Gildiskoma**
Viðvíkjandi uppsøgn, fylgir hesin sáttmáli ásetingunum um uppsøgn av sáttmálanum millum Havnar Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag § 40. Hesin sáttmáli hevur gildi frá 1. apríl 2019, og kann sigast upp av pørtunum við 4 mánaðar ávaring til ein 1. mai, í fyrsta lagi til 1. mai 2020.

Rætturin at fara í arbeiðssteðg, ella samhugaarbeiðssteðg fylgir arbeiðsrættarligum reglum á økinum.

**Sáttmálaeintøk**
Hesin sáttmáli verður undirskrivaður í tveimum eintøkum, og hvør partur fær sítt eintak.

Tórshavn, tann 15/10 2019

Hans Joensen

Havnar Arbeiðarafelag

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

HJ AO